# Vinnumálaráðið

Dagfesting: 24.04.2026
Mál nr.: 25/28459
Málsviðgjørt: Jm

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu (Fuglaveiðulógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 86 frá 7. mai 2025, verða gjørdar hesar broytingar: |
| | **1.** Aftan á § 17 verður sett:<br><br>"**17 a.** Uttan mun til ásetingarnar í § 17, stk. 1 og 2, kann tann, sum eigur, festir ella leigar lendi, søkja um loyvi at skjóta grágás og brandgás á hesum lendi, um vísast kann á, at grundaðir trupulleikar standast av henni. Landsstýrisfólkið kann áseta eitt ovara mark fyri talið á grágás og brandgás, sum skjótast kann. *Stk. 2.* Loyvi eftir stk. 1 er treytað av, at umsøkjarin hevur vápnaloyvi og váttar at kenna fuglin, sum loyvið fevnir um. *Stk. 3.* Landsstýrisfólkið ásetur í loyvinum nærri treytir fyri at skjóta grágás og brandgás, undir hesum nær loyvt er at skjóta grágás og brandgás, |

| | |
|---|---|
| | loyvd skotvápn og lóður, at tann, ið hevur loyvi, skal boða frá, hvussu nógv grágás og brandgás er skotin, og at fuglurin skal latast myndugleikunum til kanningar uttan viðurlag, um biðið verður um tað. Loyvishavin skal hava loyvi uppi á sær, tá ið skotið verður.<br>*Stk. 4*. Tann, sum hevur fingið loyvi at skjóta grágás og brandgás eftir stk. 1, kann loyva einum øðrum persóni at skjóta grágás og brandgás á tí øki, sum loyvið fevnir um, treytað av, at viðkomandi hevur søkt um og fingið loyvi frá landsstýrisfólkinum.<br>*Stk. 5.* Loyvi eftir stk. 4 skal vera skrivligt, og loyvishavarin skal hava hetta loyvið og loyvið eftir stk. 1 hjá sær, tá ið skotið verður. Loyvið skal vísast politinum, um biðið verður um tað.” |
| § 17 b, 1. pkt.: Landsstýrismaðurin stílar fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás verða framdar.<br>*2. pkt. ……* | **2.** § 17 b, 1. pkt.: “Landsstýrismaðurin stílar fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágás og brandgás verða framdar.” |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2031. |